## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin lot av vestri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og regn ella vátakavi, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av útnyrðingi og kavaælingur. Hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Um kvøldið minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin um frostmarkið.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

# Heiðursrit til Eyðun Andreasen




*Eyðvinur eitur bókin, sum Fróðskaparfelagið hevur givið út*

**Føroya Fróðskaparfelag hevur givið út bókina, Eyðvinur, sum er heiðursrit til Eyðun Andreassen, professara**

BÓKAÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Við bókarheitinum verður gjørt vart við, at navn og maður hóska saman. Eyðun hevur uppfunnið hugtakið fólksligt almenni í doktararitgerðini við sama heiti, og hann er heitur talsmaður fyri dansi og kvæðagranskari. Hann er fólkaminnisfrøðingur, mentafrøðingur, fjølmiðlafrøðingur, formaður í granskingarráðnum og tekur lut í almenna orðaskiftinum um bókmentir og mál, tónleik og samfelagsviðurskifti.

Harafturat kemur ein brennandi áhugi fyri, hvussu fólk bera seg at og skipa seg í framhaldi av samfelagsmentanini. Um hetta og mangt annað hava starvsfelagar víða hvar skrivað.

Greinirnar eru skipaðar í fimm partar. Í fyrsta parti, Fólksligt almenni, eru greinirnar avleiddar av doktararitgerðini hjá Eyðuni og viðgera metodu og arbeiðslag í fólkaminnisfrøði. Næsti partur er greinir um skaldskap av manna munni og innsavning undir yvirskriftini Kvæði og sagnir. Í triðja parti, Mentan og søga, eru greinirnar skiftar í tríggjar undirpartar. Í Trúgv og trúarviðurskifti viðgera greinirnar eitt nú kirkjuritual og bíbliumyndir. Undir Siðir og skikkir røkka evnini frá bókhaldi og hjúnavíglsu, og Land og skúli viðger topografiskar lýsingar av Føroyum, fólkaskúlan og hvussu eplini komu til Føroya.

Seinastu tveir partarnir eru Bókmentir og Mál. Har røkka evnini frá Vølsungasøgu og Ringinum hjá Wagner til jazz, Bob Dylan, postkolonialismu og týðing í bókmentasøguni. Málsligu greinirnar eru um gøtudanskt, um baðstovur og teldumál.

Ritstjórnað bókina hava Malan Marnersdótir, Jens Cramer og Anfinnur Johansen. Føroya Fróðskaparfelag gevur út, og bókin kostar 360 kr í bókabúðunum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 2 |
| Tromsø | -5 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -5 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -14 |
| Moskva | -10 |
| Berlin | -3 |
| Warzawa | -7 |
| Kiev | -9 |
| Bukarest | -4 |
| Paris | -1 |
| Madrid | 3 |
| Róm | 7 |
| Malorca | 4 |
| Athen | 8 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 9 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | -- |
| New York | 0 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. vestan fyri Lofoten fer í landsynning og dýpist. Vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft enn móti Føroyum.




**Í dag:**
Hátrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað. Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/2 kl. 06⁰⁰–21/3. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,8°
Minsti hiti máldur í febr.: -11,0° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,5 mm – mált frá 28/2 kl. 06⁰⁰–01/3 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 65,4 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

2. mars

20.febr. Mánin longst frá jørðini
24. febr. Fullmáni
3. mars Seinna kvarter
8. mars Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. mars | 10.47 | 23.26 | 09.47 | 22.26 | 10.02 | 22.41 | 00.24 | 12.47 | 01.24 | 13.47 | 09.02 | 21.41 | 08.02 | 20.41 | 11.02 | 23.41 | - | 12.02 | 10.32 | 23.11 | 11.47 | - |
| 3. mars | - | 12.05 | 11.05 | 23.46 | 11.20 | - | 01.26 | 14.05 | 02.26 | 15.05 | 10.20 | 23.01 | 09.20 | 22.01 | - | 12.20 | 00.41 | 13.20 | 11.50 | - | 00.26 | 13.05 |
| 4. mars | 00.46 | 13.27 | - | 12.27 | 00.01 | 12.42 | 02.46 | 15.27 | 03.46 | 16.27 | 11.42 | - | 10.42 | 23.11 | 01.01 | 13.42 | 02.01 | 14.42 | 00.31 | 13.12 | 01.46 | 14.27 |
| 5. mars | 01.56 | 14.26 | 00.56 | 13.26 | 01.11 | 13.41 | 03.56 | 16.26 | 04.56 | 17.26 | 00.11 | 12.41 | 11.41 | - | 02.11 | 14.41 | 03.11 | 15.41 | 01.41 | 14.11 | 02.56 | 15.26 |
| 6. mars | 02.55 | 15.24 | 01.55 | 14.24 | 02.10 | 14.39 | 04.55 | 17.24 | 05.55 | 18.24 | 01.10 | 13.39 | 00.10 | 12.39 | 03.10 | 15.39 | 04.10 | 16.39 | 02.40 | 15.09 | 03.55 | 16.24 |

5 707265 100036 >